# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1310.
# Tíðarskeið: 20/03-27/03 - 2013

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund, Regin Kristiansen, Luis Ridao Cruz og Jens Arni Thomassen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldu vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Eyka uppgáva:** Nakað av toski, rogni og øðrum, varð selt til matstovuvinnuna í Havn.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. CTD-in. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið 20/3 kl. 21. Byrjaðu at taka støðir á Føroyabanka hósmorgunin og tóku 5 støðir tann dagin. Fríggjadagin og leygardagin var illveður, og vit tóku bara eina støð. Sunnudagin var veðrið betri, og tóku vit 5 støðir. Tíverri gjørdist trolið fast í botni seinnapartin sunnudagin, og endin var, at vit mistu bæði trol og lemmar. Vit dreggjaðu eftir trolinum mánamorgunin, men fingu tað ikki upp. Vit sigldu tí á Havnina mánadagin og landaðu veiðina har. Vaktarskipið ”Brimil” fekk trolið og annan lemmin upp týsdagin 26/3-2013, og skulu teir hava stóra tøkk fyri tað. Sostatt fingu vit bara tikið 10 av 29 hálum.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var ikki eftir ætlan (umleið 400), tí vit høvdu so fá hál.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 3. apríl. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 20. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Úrslitini skulu takast við fyrivarni, nú bert 10 av 29 støðum vóru tiknar. Tað var meira av toski at fáa enn í mars 2012, men nakað tað sama í mun til 2011 (Talva 1), sum tó er lítið samanborið við onnur ár (Mynd 1). Vit fingu sera lítið av hýsu, men tó nakað av heilt smáari. Hinvegin fingu vit meira av upsa. Magakanningarnar vístu, at tað var meira til av bæði smáari og stórari (gýtandi) nebbasild enn vanligt hevur verið seinastu árini. Tann stóra nøgdin av krabbadýrum, sum onnur ár hevur verið at sæð í toska- og hýsumagum var minkað munandi í ár.

**Talva 1**. Veiða, nytrur og magar, tikin á túri 1310 – yvirlitstroling á Føroyabanka. Legg til merkis, at bara 10 av 29 hálum vórðu tikin.

| FISKASLAG | 2013 10 hál KG | Nytrur | Magar | 2012 29 hál KG | 2013/2012 Lutfall KG per hál | 2013/2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| TOSKUR | 1141.635 | 111 | 23 | 1319.159 | 2.5 | 1.2 |
| GLÝSUFISKUR | 511.504 | | | 197.330 | 7.5 | 1.9 |
| HAVMÚS | 399.986 | | | 3543.628 | 0.3 | 0.9 |
| UPSI | 161.510 | 41 | 9 | 210.705 | 2.2 | 2.0 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 119.818 | | | 97.379 | 3.6 | 5.8 |
| LONGA | 105.070 | 18 | 4 | 294.310 | 1.0 | 1.0 |
| LOLIGO | 94.231 | | | 94.564 | 2.9 | 0.6 |
| HÝSA | 85.280 | 45 | 19 | 1318.377 | 0.2 | 0.1 |
| HEXANCHUS | 75.000 | | 1 | 0.000 | | |
| SKRAMBUL | 42.751 | | | 58.583 | 2.1 | 1.0 |
| KALVI | 23.280 | 1 | 1 | 41.890 | 1.6 | 7.9 |
| SKØTA | 17.465 | | | 40.547 | 1.2 | 1.1 |
| KNURRHANI | 10.253 | | | 6568.734 | 0.0 | 0.5 |
| GULLLAKSUR | 8.375 | | | 797.759 | 0.0 | 0.1 |
| BROSMA | 7.020 | | | 52.065 | 0.4 | 0.4 |
| HAVTASKA | 6.485 | | | 94.940 | 0.2 | 1.7 |
| GLASKVOYSA | 3.183 | | | 53.546 | 0.2 | 2.2 |
| TUNGA | 2.426 | | | 9.693 | 0.7 | 0.3 |
| NEBBASILD | 2.360 | | | 8.163 | 0.8 | 1.5 |
| STREYMSILD | 2.214 | | | 0.000 | | |
| SANDSPRØKA | 1.439 | | | 3.963 | 1.1 | 0.5 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 1.083 | | | 204.270 | 0.0 | 0.3 |
| ROSSAMAKRELUR | 0.886 | | | 29.861 | 0.1 | 0.4 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 0.490 | | | 5.185 | 0.3 | 0.3 |
| TILSAMANS | 2823.744 | 216 | 57 | | | |







Mynd 1. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) av toski, hýsu, longu og upsa hjá Magnusi Heinasyni í mars 1983 til 2013. Fyri 1994-1995 eru eingi tøl tøk, og í 2004-2005 var eingin túrur gjørdur.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum ”Tur1310d.doc”.

<u>Petur Steingrund</u>